VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í dag:
Gul til stívt andøvsgul av norði, um kvøldið lot av ymsum ættum. Ælingur, men eisini sólglottar og hitin millum 6 og 9 stig.



Veðrið leygardagin:
Lot til andøvsgul av ymsum ættum og sólglottar, men kanska okkurt ælið. Hitin millum 5 og 8 stig.



Veðrið sunnudagin:
Fleyr til gul av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 4 og 7 stig.

Veðrið mánadagin og týsdagin:
Mánadagin strúkur í vindi ella hvassur vindur av suðri og regn. Týsdagin upp í andøvsgul av útsynningi og ælingur. Hitin millum 6 og 10 stig.

Langtan

Innistongd hava tey staðið tað mesta av vetrinum. Veðrar og heystlomb. Nakrir hava kortini verið úti eina tíð og gjørt sína samfelagsskyldu, men fleiri hava bara verið inni og etið turt hoyggj. Nú vilja teir út ljósið aftur

VÁRLONGSUL
Edvard Joensen

Øllum leingist okkum eftir ljósum og lýggjum tíðum. Bæði tvíbeint og ferføtt, eins og tað, sum flýgur og skríður gleðir seg, nú sólin er farin at hækka og ljósari gerst fyri hvønn dag.

Ljósu tímarnir eru farnir at økjast í tali. Serliga í seinna enda hevur tað gjørt stóran mun, síðan vit snýttu sólina ein tíma og fóru yvir aftur til summartíð.

Øll gleðast vit, nú ljósari gerst. Tey tvíbeintu fáa betri hug til urtagarðin ella fótbóltsvøllin. Onkur gongur langar túrar, og onnur hava betri hug at fara á flot.

Eisini tey fýrføttu fara at merkja, at nú eru ljósari tíðir í væntu. Tey hava staðið - stundum í myrkri í hálv og heil samdøgur - og bíðað eftir hesum vælsignaða ljósinum, sum boðar frá, at nú fer grasið at grønka, og lýkkan kemur aftur í luftina.

Ikki vita teir, sum standa so altráir og stunda móti úthurðini, at stokkut verður løtan, teir fáa undir víðum lofti. Einar fýra mánar ella so, og so bíðar flettingarborðið.

Men ta stuttu tíð teir hava um summarið, hana liva teir.

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	÷12
Nuuk	÷9
Qaqortoq	÷5
Ammassalik	0
Saint John's	÷1
Halifax	2
Reykjavík	7
Seyðisfjørður	9
Tórshavn	7
Lerwick	6
Aberdeen	6
London	6
Tromsø	6
Bergen	8
Oslo	–
Stokkhólm	2
Keypmannah.	0
Helsinki	1
Moskva	1
Berlin	2
Warzawa	0
Kiev	5
Bukarest	10
Paris	8
Madrid	15
Róm	–
Malorca	17
Athen	15
Malta	15
Tunis	21
Beijing	6
New Dehli	37
Bangkok	34
Jakarta	32
Sydney	21
New York	3
Miami	25
Los Angeles	21
Meksikobýur	16
Panama	–
La Paz	13
Rio de Janeiro	–
Buenos Aires	18

LUFTTRÝSTIÐ

Eitt lágtrýst, 1000 hPa. sunnan fyri Ísland fer norðureftir. Eitt annað lágtrýst, 1006 hPa. yvir Eystursjónum fer í útnyrðing og dýpist nakað.

Lágtrýstið yvir Hetlandi verður yvir Føroyum leygarnáttina. Lágtrýstið í útsynning úr Írlandi fer spakuliga norðureftir.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 09/04 kl. 06⁰⁰– 10/04 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 7,1°
Minsti hiti máldur í apríl: ÷9,9° Mesti hiti máldur í apríl: 15,0°

AVFALLIÐ



Avfallið: 0,3 mm – mált frá 09/04 kl. 06⁰⁰–10/04 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í apríl: 4,0 mm

TURRIKLÆÐI
HÚGVUR
T-SHIRT
KEPPAR
og FLØGG

12. MAÐUR
www.footballsupporters.fo

VESTFALLSKYRRINDI

4. apríl: Mánin longst frá jørðini
10. apríl: Fyrra kvarter
16. apríl: Fullmáni
17. apríl: Mánin næstur jørðini

Kelda: Almanakkin 2003

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	Suðuroyar-/Vágafirði sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	Hestfirði/Sundalagnum sp.	Vestmannasundi fp.	Vestmannasundi sp.	Mykinesfirði fp.	Mykinesfirði sp.	Nólsoyarfirði fp.	Nólsoyarfirði sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði sp.	Hvannasundi fp.	Hvannasundi sp.	Fugloyarfirði fp.	Fugloyarfirði sp.
11. apr	03.03	15.27	02.03	14.27	02.18	14.42	05.03	17.27	06.03	18.27	01.18	13.42	00.18	12.42	03.18	15.42	04.18	16.42	02.48	15.12	04.03	16.27
12. apr	03.51	16.13	02.51	15.13	03.06	15.28	05.51	18.13	06.51	19.13	02.06	14.28	01.06	13.28	04.06	16.28	05.06	17.28	03.36	15.58	04.51	17.13
13. apr	04.35	17.00	03.35	16.00	03.50	16.15	06.35	19.00	07.35	20.00	02.50	15.15	01.50	14.15	04.50	17.15	05.50	18.15	04.20	16.45	05.35	18.00
14. apr	05.25	17.48	04.25	16.48	04.40	17.03	07.25	19.48	08.25	20.48	03.40	16.03	02.40	15.03	05.40	18.03	06.40	19.03	05.10	17.33	06.25	18.48

5 707265 100050 >